# Reglugerð fyri stuðul til mistar inntøkur í samband við COVID-19

Hendan reglugerð viðgerð treytir hjá ítróttafelagsskapum fyri at fáa peningaligan stuðul í samband við mistar inntøkur av COVID-19.

*Nýtsluøki*

**§1.** Reglugerðin fevnir um ítróttafelagsskapir, hvørs tiltøk eru avlýst ella nógv avmarkað vegna almennu tilmælini av COVID-19.

**§2.** Ítróttafelagsskapir sambært hesi reglugerð eru sambondini í ÍSF og limafeløg tess.

*Upphædd*

**§3**. Løgtingið hevur játtað ÍSF 4.000.000 kr., ið eru oyramerktar til stuðul til mistar inntøkur hjá ítróttafelagsskapum í samband við COVID-19.

*Tiltøk fyriskipað av ítróttafelagsskapum*

**§4.** Tiltøk fyriskipað av ítróttafelagssskapum eru tiltøk, har almenningurin hevur atgongd ella kann luttaka móti atgongugjaldi, tó uttan at talan er um vinnuligt virksemi.

**§5.** Til ítróttafelagsskapir, hvørs tiltøk sbrt. § 4 eru avlýst ella nógv avmarkað vegna almennu tilmælini um fyribyrging av COVID-19 i tíðarskeiðinum 12. mars til 30. juni 2020, verður stuðul latin til at endurrinda mista inntøku.

*Stk. 2.* Stuðulin sbrt. stk. 1 verður endaliga staðfestur við støði í góðkendum umsóknum, men kann ongantíð verða meira enn 250.000 kr. fyri hvønn ítróttafelagsskap. Mista inntøkan verður útroknað við støði í miðal inntøkuni fyri árini 2019 og 2018, sum skal vera skjalprógvað og staðfest.

*Stk. 3.* Er ikki gjørligt at rokna mistu inntøkuna sbrt. stk. 2, fær ítróttafelagsskapurin stuðul sbrt. skjalprógvaðum og staðfestum útreiðslum.

*Stk. 4.* Stuðulin sbrt. stk. 1 er treytaður av, at avlýstu tiltøkini ikki verða hildin seinni í 2020.

*Stk. 5.* Harumframt er stuðul sbrt. stk. 1 treytaður av, at metta inntøkan sbrt. stk. 2 er í minsta lagi 20.000 kr. Er talan um ítróttafelagsskap ið hevur fleiri smærri tiltøk, skal inntøkan fyri tiltøkini til samans vera í minsta lagi 20.000 kr.

*Stk. 6.* Hevur viðkomandi ítróttafelagsskapur fingið stuðul úr aðrari almennari stuðulsskipan, verður hesin stuðul mótroknaður í stuðli sbrt. stk. 2.



SKÁLKUR.fo Televarpið ATLANTIC AIRWAYS sms

*Umsókn*

**§6.** Umsókn um stuðul skal latast inn til ÍSF í seinasta lagi 31. august 2020.

*Umsiting*

**§7.** Umsitingin í ÍSF innstillar til starvsnevnd ÍSF um hvør fær stuðul sbrt. reglugerðini. Starvnevnd ÍSF tekur endaliga avgerð um hvør fær stuðul.

*Eftirlit og afturrindan av stuðli*

**§8.** ÍSF hevur eftirlit við, at ásetingarnar í reglugerðini verða fylgdar, og at tey sum fáa stuðul, lúka treytirnar í reglugerðini.

*Stk. 2.* Lýkur ein ítróttafelagsskapur ikki longur treytirnar fyri at fáa stuðul, skal stuðulin heilt ella lutvíst rindast aftur.

*Stk. 3.* Hevur ein ítróttafelagsskapur í sambandi við umsókn ikki givið røttu upplýsingar ella móti betri vitan av órøttum fingið stuðul, skal viðkomandi ítróttafelagsskapur gjalda aftur ta upphædd, sum er fingin av órøttum.

*Samtykt á starvsnevndarfundi 3. juli 2020*